# MAI-TILBOÐ

upp til 30% í avsláttri



HTH tú fært tað altíð munandi betri...

## Køkar, baðirúm, klædnaskáp og hvítvørur

TEFAL
Dampstrúkijarn
Vanl. prísur 599,-
335,-
SPAR 264,-

WILFA
Ketil FP321
1,7 ltr., stál, fjalt hitalikam
Vanl. prísur 599,-
495,-
SPAR 104,-

EXIDO
Breyðsnerkjari
Tiðnar fryst.
Vanl. prísur 799,-
635,-
SPAR 164,-

BLOMBERG
Ovnur FBC31X
Yvir-/undirvarmi, grill og luft
Keramikkpláta HHH75B5
Vanl. prísur 8995,-
6595,-
SPAR 3100,-

HAKA
Microovnur M8020
20 ltr., 800 Watt, 30 minuttir
Vanl. prísur 1495,-
965,-
SPAR 500,-

ZANUSSI
Køliskáp ZT155
B:55 H:85 D:60
Vanl. prísur 3195
2495,-
SPAR 700,-

BLOMBERG
Komfýrur KNA43W
Yvir-/undirvarmi, luft og grill
Vanl. prísur 7995,-
6395,-
SPAR 1600,-

ZANUSSI
Turkitrumla TD4100
Vanl. prísur 3195,-
2395,-
SPAR 800,-

BLOMBERG
Komfýrur KE265
Yvir-/undirvarmi, grill
Vanl. prísur 4995,-
3495,-
SPAR 1500,-

Miele
Vaskimaskina W430
1400 umfør/min.
Soft Tronic trumla
10 ÁRA GARANTI

Elkeyp
HTH Køksmiðstøðin
Á Hálsi • FO-100 Tórshavn • Tel. 31 49 49 • Fax 31 13 30




Christian Høgni Jacobsen:

# Ikki favoritt plássið



*- Nú Pól ikki verður við, fái eg møguliga møguleikan, og so má eg bara royna at gera mítt ítarsta,, heldur Christian Høgni um uppgávuna á høgra bakki*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

FÓTBÓLTSPRÁT
*Páll Holm Johannesen*

Týskvøldið sóu vit fyri fyrstu ferð, Christian Høgna Jacobsen, leika á høgra bakverja á landsliðnum. Hann hevur leikt stóran part av kappingarárinum á høgra bakki í Vejle, men kortini hevur Henrik Larsen nýtt sum áleypara á landsliðnum.

Sjálvur dylir runavíkingurin ikki fyri, at hann heldur vil spæla longri frammi á vøllinum. — Høgribakkur er ikki mítt favoritt pláss, men eg spæli har, eg verið settur at spæla, sigur Vejle-leikarin.

Vanligi høgri bakkur, Pól Thorsteinsson, er leikbannaður ímóti Íslandi, og tí má nýggjur bakverji finnast til tann dystin. Christian Høgni má metast at vera eitt av evnunum til Íslandsdystin, og hann vónar at fáa møguleikan.

- Nú Pól ikki verður við, fái eg møguliga møguleikan, og so má eg bara royna at gera mítt ítarsta, greiðir Christian Høgni Jacobsen frá.

Um avrikið á Tórsvølli, metti Vejle-leikarin vera á eini leið. – Eg byrjaði illa, men spældi meg upp, og longur tað leið út í dystinum, betri og betri gekk tað, sigur Christian Høgni í stuttari viðmerking.

Hans Fróði Hansen:

# -Eg taki tað púra róligt

FÓTBÓLTSPRÁT
*Páll Holm Johannesen*



*Við tveimum leikbannaðum liðfeløgum er lítið at ivast í, at Hans Fróði aftur verður á vøllinum móti Íslandi*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

B68-verjuleikarin, Hans Fróði Hansen, er ein av leikararunum, sum er í hitanum til eitt pláss í miðverjuni ímóti Ísland 7. juni.

Henrik Larsen valdi í báðum dystunum ímóti Kasakstan at nýta Hans Fróða og Jón Róa Jacobsen í miðverjuni, og tí kundi nógv týtt á, at teir báðir fara at manna miðverjuna ímóti Íslandi.

Til dystin í Reykjavík, eru suðuroyingarnir, Óli Johannesen og Pól Thorsteinsson, leikbannaðir, og tí er væl hugsandi, at boð verða send eftir B68-verjuleikaranum.

Sjálvur sigur leirvíkingurin seg taka tað púra róligt.

- Avrikið í dag var ikki av teimum bestu, men sunnudagin gekk betri hjá mær og Jón Róa, so eg vóni sjálvsagt at fáa møguleikan ímóti Íslandi. Annars taki eg tað púra róligt, og fái eg møguleikan, so ætli eg mær at taka hann 100%, segði Hans Fróði Hansen eftir dystin.

# Súni væl nøgdur



*- Tað gekk nógv betri í dag enn sunnudagin, helt Súni týskvøldið, og tað mundu ikki vera nógv, sum søgdu honum í móti*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

FÓTBÓLTSPRÁT
*Páll Holm Johannesen*

Síðan Henrik Larsen tók við landsliðsvenjarastarvinum hevur verið torført at funnið ein vinstra bakverja. Vanligi bakverjin, Jens Kristian Hansen, hevur verið nógv darvaður av skaða seinasta árið, og royndirnar við at finna ein avloysara hava ikki verið av teimum bestu.

Týskvøldið fingu vit tó sjón fyri søgn, at vit hava leikarar, ið kunnu røkja uppgávuna á vinstra bakki. Eftir eitt heldur misjavnt avrik ímóti Kasakstan sunnudagin, beit gøtumaðurin, Súni Olsen, rættiliga frá sær týskvøldið á Tórsvølli. Dystirnir ímóti Kasakstan vóru teir fyrstu altjóða dystirnar, GÍ-leikarin, hevur spælt undir Henrik Larsen, og hann var uppsettur at vísa hvør dugur var í honum.

- Tað gekk nógv betri í dag enn sunnudagin, og serliga haldi eg, at spælið niðaneftir vøllinum eydnaðist væl, segði Súni Olsen eftir dystin.

Eftir dystin týskvøldið, metir Súni, at hann er í myndini til pláss á liðnum til landsdystirnar ímóti Íslandi og Týsklandi. — Mínir møguleikar eru sjálvandi treytaðir av, hvussu tað fer at ganga í GÍ næstu mánaðirnar, men eftir dystin í dag, havi eg góðar vónir, men í síðsta enda er tað upp til Henrik Larsen, so vit fáa at síggja, sigur Súni Olsen at enda.

Ingi Højsted:

# -Skuffandi

FÓTBÓLTSPRÁT
*Páll Holm Johannesen*

Debutanturin, Ingi Højsted, var alt annað enn nøgdur við sítt avrik í sínum fyrsta landsdysti. – Tað hevur gingið rættiliga væl hjá mær seinastu dystirnar í Arsenal, og eg føli meg væl fyri, og tí var avrikið hjá mær skuffandi í dag, segði Ingi Højsted eftir dystin ímóti Kasakstan.

Spurdur um hann kendi, at eitt ávíst trýst var á honum, svarar Ingi, at tað plagar ikki at ávirka hann. Arsenal leikarin ásannar, at tað serliga í byrjani gekk illa at fáa glið á spælið á miðvøllinum, og at hann hevði torført at spæla seg uppaftur, og at hann misti ov nógvar bóltar í uppspælinum.

Á venjingarleguni í Spania í februar gekk rættiliga væl hjá Inga, og hann var tí rættiliga uppsettur undan dystinum ímóti Kasakstan at vísa, hvør dugur er í honum, so hann kundi gera galdandi til dystirnar ímóti Íslandi og Týsklandi.

- Eftir avrikið í dag eri eg ikki vísur um eg fái boð til dystirnar í juni, men eg vóni tað sigur Ingi Højsted at enda.



*Yngsti føroyski landsliðsleikarin nakrantíð, Ingi Højsted, lat illa at avrikinum hjá sær ímóti Kasakstan, men vónar kortini at fáa landsliðsboð til dystirnar ímóti Íslandi og Týsklandi*

*Mynd: Álvur Haraldsen*